Føroyar mítt land:

# – Sjálvt Effersøe á Vaglinum, hann er í góðum lag…



*Gongin seinast í næstsíðstu øld. Men er tikin, tá Hans Andreas Djurhuus var smádrongur ella hálvvaksin. Handil var í Fútastovu, har maður stendur í durinum. Ovast í Gongini hómast norðrara hornið á Áarstvou*

**Ólavsøkan er umframt Havnina eisini søga – upprunin er jú at minnast Ólav kong, sum fall á Stiklastøðum fyri skjótt túsund árum síðani. Men eitt slíkt høvi fær okkum eisini at hugsa um høvuðsstað okkara og um farnar tíðir. Vit minnast tey, ið dvælst hava her og fólk, ið hava sett sítt eyðkenni á mentan okkara, skrivar Eirikur Lindenskov í hesi ólavsøkuhugleiðing**



*Áarstova, har Hans Andreas og Janus Djurhuus vuksu upp. Húsini stóðu beint yvir av Café Natúr, sum hómast vinstru megin í myndini. Høgrumegin síggjast Knútsstova og Vertshúsið*

**HUGLEIÐING**

*Eirikur Lindenskov*

*Tað er einaferð um árið,*
*at ólavsøka er,*
*tá liva allir føroyingar*
*í aðrari verð.*

Soleiðis yrkir Kári Jacobsen í sanginum "Á tann deiliga Havn", sum hevur verið at hoyrt hvørja einastu ólavsøku, síðani sangurin varð til seinasta í áttatiárunum. Og rætt hevur hann. Ólavsøkan er nakað serligt, ikki bara fyri okkum havnarfólk, men eisini fyri allar gestir, sum leita sær av bygd til Havnar at hátíðarhalda tjóðarhátíð alra føroyinga.

Hóast tað seinnu árini hevur verið roynt at tjóvstartað ólavsøkuna eitt sindur fyrr við ymsum tiltøkum, so byrjar ólavsøkan ikki rættiliga, fyrr enn hon verður sett á Vaglinum ólavsøkuaftan, og tú ert búgvin í búna at fara til kappróður, tí kappróðurin er eitt sereyðkenni fyri ólavsøkuna.

Sum í nøkrum av sendingunum "Føroyar mítt land" á Rás2, har hesar hugleiðingar vórðu lisnar seinasta fríggjadag, fer undirritaði at halda seg til umhvørvi í gomlu Havnini – eisini nú vit hugaleiða um ólavsøkuna. Tí ólavsøkan er umframt Havnina eisini søga – upprunin er jú at minnast Ólav kong, sum fall á Stiklastøðum fyri skjótt túsund árum síðani. Men eitt slíkt høvi fær okkum eisini at hugsa um høvuðsstað okkara og um farnar tíðir. Vit minnast tey, ið dvælst hava her og fólk, ið hava sett sítt eyðkenni á mentan okkara.

Her niðri í gomlu Havnini dvældist Jens Christian Svabo stóran part av sínum vaksna lívi. Maðurin, ið sum tann fyrsti royndi at skriva niður føroyska málið – bara við tí fyri eyga, at eftirkomarar skuldu vita, hvussu føroyska málið hevði verið, tí hann var sannførdur um, at málið fór at hvørva. Svabo búði í Pæsastovu, sum liggur millum Klokkaragøtu og Bringsnargøtu, og hevur hann óivað sitið har við fjøðurpenni og skrivað – og spælt fiól, tá tað lagið var á honum.

Í sama umhvørvi vaks upp pilturin V. U. Hammershaimb, ið sum 2-3 ára gamal flutti við móður og systur inn til ommuna í Nýggjustovu, Armgard Marie Egholm. Vensil mintist væl ommubeiggjan, Jens Christian Svabo, sum doyði, tá Vensil var fimm ára gamal.

Á døgum Svabo livdi eisini Nólsoyar Páll, tjóðskaparhetjan. Hann man mangan hava sitið flótt inni hjá bróðrinum í Nólsoyarstovu, Jákupi Nolsøe, handilsforvaltara, ið hevur lýtt á og skrivað niður, meðan Páll yrkti eitt ørindi fyri og annað eftir í Fuglakvæðnum.

Flyta vit okkum eitt sindur fram í tíðina, so renna Áarstovubrøðurnir, Hans Andreas og Janus Djurhuus okkum í huga. Teir hava báðir – við ymiskligu skaldskaparevnum – sett sín serliga dám á okkara bý og okkara mentan. Áarstova er burtur, og grundin løgd undir asfalt. Mangur snapsurin og mong ølin verða á ólavsøku drukkin á beinkinum á "Áarstovugrund": Húsini stóðu beint norðran fyri Vertshúsið – ella beint yvir av Café Nátúr, fyri at brúka nútíðar terminologi. Undir hesi lítlu lon vuksu hesir mætu mentamenn upp við Havnará tutlandi undir húsavegginum eystanfyri. Úr henni hevur hann uttan iva eisini fingið íblástur – eisini tá hann yrkti sangin um "kistuna av kamfertræ" um skyldmannin, Dyrhuus á Vertshúsinum.

*- Gongin lýsir í morgunsól*
*Tað skróvar í tómum tunnum*
*niðri á sandi er barnagól*
*og kvaggan av sutlandi dunnum*

Tað var eisini hann, sum yrkti Barnarímurnar, ið vóru okkum øllum børnum so kærar. Hann yrkti um Kongaríkið í Bábylon, um hin bjartoygda dáan og um Karina, sum hevði gult og purlut hár. Hans Andreas gjørdist ikki gamal maður, men áin man hava havt sín týdning, tí vaksnamannaheim hansara var eisini við Havnará – men við hin endan á ólavsøkuni, oman fyri Sjónleikarhúsið – og húsini bera navnið hjá Barnaheiminum, Áarstova.

Í Bringsnargøtu varð William Heinesen føddur, í Bartskerstovu, ella hjá Kathrinu Christiansen, sum vit í dag nevna húsini. Har vaks hann upp, og tí hevur umhvørvið í niðara enda á ólavsøkuni eisini havt stóran týdning í heimsbókmentunum, sum William hevur borið úr Bartskerstovu og út í øll heimsins lond. William hevur eisini sín hátt at lýsa umhvørvið niðri í Gongini:

- *"Vertshúsið, ella Hotel Djurhuus, sum var heitt fínara heitið, dagar høgt upp móti dimmari luft, stórt og margháttliga samanbygt sum eitt asiatiskt klostur. Á báðar hendur eru skýmligar tvørgøtur við brúgvum ella trappum. Upp móti himni hevjar seg Nólsoyarstova sum ein veneziansk glæstriborg..."*

Tá ið vit hava valt so landafrøðiliga at lýsa ólavsøkuna við "ovara" og "niðara" enda, so er hetta sjálvandi myndaliga talað. Ólavsøkan er tjóðarhátíð alra føroyinga, men ólavsøkan er serliga í Havn, og ólavsøkan er serliga á Áarvegnum, á Vaglinum og í Niels Finsensgøtu. Meðan kappróðurin er, er ólavsøkan eisini á Tinganesi og eisini úti á molanum - har vit jú bara sleppa hesar báðar tímarnar á ólavsøku, tí ta løtuna lata teir sjengenmúrararnar falla...

Men tá kappróðurin er av, steypini handað á Bursatanga, so flytist niðara ólavsøkumarkið aftur niðan á Áarstovugrund.

Veðrið hevur sjálvandi alt at siga á ólavsøku. Er gott veður, leita øll sær oman í býin, men regnar – og regnar illa, og av grimd, sum tað gjørdi ólavsøkudag í 2001, so er fólkatómt á Vaglinum. Tann, ið ikki trýr tí, kann bara spyrja Astu í kioskini á Vaglinum. Tí hon tók eina mynd seinnapartin hendan ólavsøkudag út gjøgnum kiosklúkuna – og har var bara eitt einasta fólk á Vaglinum, tað var tíðindaleiðarin í Sjónvaprinum, sum var farin til Astu at keypa sær tubbakk. Hevði sólin sæð, so vóru minst túsund fólk á Vaglinum ein slíkan ólavsøkudag – men tá er gott at kunna sita heitt og fjálgt og turt við búgvið borð hjá frægum fólki.

Vit vænta sjálvandi ikki regn á ólavsøku í ár – í øllum førum ikki so nógv, og tí er hýrurin góður, og vit kunnu syngja víðari við Kára í hansara "ólavsøkukantatu":

*- Sjálvt Effersøe á Vaglinum,*
*hann er í góðum lag...*

*Frøast kunnu øll um, at Havnin*
*hon er vár.*
*Ólavsøkusiðurin skal liva ár um ár.*
*Onga aðrastaðni íhesi víðu verð*
*er hýrurin so góður, sum tá*
*ólavsøka er*

Higani kunnu vit so kortini tjóvstarta ólavsøkuna við at ynskja øllum eina góða ólavsøku við takkarorðunum hjá Pól F til Havnina og ólavsøkuna

*Tøkk fái Havnin og fólkið, har býr,*
*fyri góð minnir og gleim,*
*sum hon á Ólavs halgaðu tíð*
*gav til hvørt Føroyarlands heim.*
*Tí ólavsøkan skal øld eftir øld*
*reka burtur klandur og sorg.*
*Veri, so leingi sum føroyingur er,*
*Tórshavn vár miðstøð og borg.*



*Midnáttarsangur á ólavsøku í hesi øldini*
*Mynd: Jens Kristian Vang*